# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir einum stuðulsfólki til 6 ára gamalt barn við serligum tørvi í Vágs kommunu at byrja 15. mars 2008 ella so skjótt sum gjørligt og fyribils fram til summarfrítíðina.

Stuðulin kemur í samstarvi við Frítíðarskúlan í Vági Sosiala deild, NSR tænastuna í Suðuroy og familjuna, at stuðla barninum í at fáa ein innihaldsríkan og mennandi dag.

Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur hóskandi útbúgving og royndir.

Arbeiðið er 15 tímar um vikuna og verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, sosialdeildarleiðara á tlf. 37 36 04.

Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til Sosiala deild hjá Porkeris – og Vágs Kommunu í seinasta lagi 3. mars 2008 kl.12.00.

**Sosiala Deild**
**Porkeris- og Vágs Kommuna**
Við Á 8 · 950 Porkeri
Tlf 37 36 04 · Tlf 22 67 04
T-post: sosialadeild@email.fo

## Frá Havnar Handverkarafelag og Eftirlønargrunni Havnar Handverkarafelags

Ársaðalfundurin verður mikudagin 12. mars 2008 kl. 19.00 á Hotel Hafnia.

Skrá samb. § 25 í lógini:

1. Val av orðstýrara
2. Frágreiðing frá farna árinum.
3. Roknskapur til góðkenningar.
4. Innkomin mál/lógarbroyting
5. Val av nevnd
6. Val av tveimum grannskoðarum
7. Ymiskt

Aftaná aðalfundin verður aðalfundur í Eftirlønargrunninum við hesi skrá:

Skrá samb. § 8 í viðtøkunum:

A. Val av orðstýrara
B. Frágreiðing frá nevndini um virki grunnsins í farna ári
C. Framløga og góðkenning av roknskapi og fíggjarstøðu
D. Støða verður tikin til, hvat gerast skal við møguligt avlop ella hall
E. Val av nevndarlimum
F. Val av grannskoðara
G. Møgulig mál frá nevnd/limum

*Sí lýsing á www.handverk.fo*

**Havnar Handverkarafelag**

**Kurhus**
Center for Neurorehabilitering

## Fysioterapeut til Danmark

Center for Neurorehabilitering – Kurhus – Dianalund søger en fysioterapeut snarest muligt (37 t/uge).

Vi søger en kollega, som gerne har erfaring inden for neurorehabilitering, er engageret, glæder sig over udfordringer og som gerne vil indgå i et velfungerende tværfagligt arbejdsmiljø, hvor man støtter og udvikler hinanden både fagligt og personligt.

Kurhus yder specialiseret genoptræning og intensiv rehabilitering til voksne med moderate til svære følger efter pludselig opstået hjerneskade. De i alt 18 døgnklienter og 2 dagklienter er i gennemsnit ind-skrevet 3-6 måneder. Til opholdet hører en udslusningsproces med hjemmetræning og supervision af personale, som er involveret i et evt. videre forløb.

Såvel det tværfaglige som det fysioterapeutiske arbejde tilrettelægges i samarbejde med klienten og foregår på såvel kropsniveau i træningslokaler som i funktionelle dagligdags aktiviteter og lystbetonede interesseområder. Nyt personale introduceres til vores interventionsprincipper samt behandlings-metoder og lærer at anvende disse i praksis med støtte fra vores udviklingsterapeuter. Kompetence-planen foregiver desuden deltagelse i forskellige kurser, som til dels tilbydes i vores egen uddannelses-afdeling.

Se den fulde annonce og læs mere om Kurhus på www.kurhus.dk

**Ansøgninger** mrk. "Kurhus fysioterapeut" modtages løbende, gerne inden den 14. marts og sendes til Center for Neurorehabilitering – Kurhus, Kurvej 8, 4293 Dianalund, Danmark.

**Yderligere oplysninger** eller funktionsbeskrivelse fås ved henvendelse til ld. terapeut Karen Nielsen, tlf. 0045 58 27 12 68.

KOLONIEN FILADELFIA
Epilepsihospitalet i Dianalund
• Center for Neurorehabilitering - Kurhus
• Specialskoler • Værkstedscenter • Botilbud
• Møde- og Konferencecenter • Undervisning
• Specialrådgivning
www.filadelfia.dk

## Petur Skeel vitjar Føroya Ellisakfør mánakvøldið 25- februar 2008, kl. 21:00

Kæru limir!

Vilja tit vita meira um isobarar, paskal og brúgvaløg?

Tað hevur eyðnast okkum at lokka okkara kæra veðurfrøðing, Petur Skeel Jacobsen, at koma at siga okkum eitt sindur frá, hvussu vit m.a. skulu skilja tað sum verður sagt, tá veðurtíðindi verða lisin upp, eitt nú í Útvarpinum.

**Føroya Ellisakfør**
www.ellisakfor.com

# Festi leyst í Svínoy

Við heimild í § 2 í løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð lýsir Búnaðarstovan við hesum niðanfyri nevnda festi leyst:

- matr. nr. 87a, vídd 171.857 fermetrar innangarðs
- matr. nr. 155a uttangarðs, einbýttur hagi Uppi í Grønu, 2 merkur og 12 gyllin
- matr. nr. 155b uttangarðs, 3 merkur í felagshaga Fyri Handan Fjøll (sum íalt er 4 merkur).

Samstundis verða, við heimild í § 6 í løgtingslóg um landsjørð, og treytað av neyðugari fíggjarlógarheimild, niðanfyri nevndu føstu ognir, sum standa á festinum, lýstar til sølu. Ognirnar verða seldar persóni, sum lýkur treytirnar at taka við festinum, og sum hevur hægsta boð. Búnaðarstovan tilskilar sær rætt til ikki at selja ognirnar saman við festinum, um hóskandi boð ikki verður fingið.

Keypspeningurin fyri ognirnar verður at rinda kontant við yvirtøku av festinum. Umsøkjari skal tí verða til reiðar at skjalprógva, at hann hevur neyðuga fígging.

Persónar, sum lúka treytirnar til jarðarbrúkskunnleika sambært § 2 í kunngerð nr. 95 frá 23. oktober 2007 um umsiting av landsjørð, og sum kunnu lúka treytirnar um bústaðarskyldu sambært § 5 í løgtingslóg um landsjørð, kunnu søkja um festið.

**Føstu ognirnar á festinum eru:**

- Fjós á Eiðinum,
  - Fóðurhøll við fjósið,
  - 3 súrhoysbrunnar,
  - Køstur,
- Seyðahús á Eiðinum,
- Seyðahús uppi í Viðurbyrgi,
- Gróthús á Eiðinum,
- Sethús á Eiðinum

Omanfyri nevndu føstu ognir verða , sambært § 11 stk. 8 í løgtingslóg um landsjørð, knýttar at rakstrinum á festinum. Hetta er tó ikki galdandi fyri sethúsini á Eiðinum.

Aðrar fastar ognir eru á festinum, sum ikki eru fevndar av hesi lýsing og fylgja sostatt ikki við festinum.

Nærri upplýsingar um festið og føstu ognirnar kunnu fáast við at venda sær til Búnaðarstovuna, tlf. 47 90 00.

Umsóknir um festið saman við tilboði uppá føstu ognirnar skal verða send Búnaðarstovuni innan 25. mars 2008.

**BÚNAÐARSTOVAN**
Frammi í Dali 166 • 410 Kollafjørður
tlf. 47 90 00 • fax 47 90 20
bst@bst.fo ▪ www.bst.fo

Sosialurin -har tað hendir